# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein áhugaverdur møguleiki

Tað var ein sera áhugaverdur møguleiki, sum varð lýstur her í blaðnum í gjár, hvussu ávísir bólkar – t. d. kvinnur kunnu stilla upp á serligum listum innanfloks.

Sjálvandi kunnu vit kjakast um, hvørt tað er rætt, at ávísir bólkar fáa serviðgerð, men tað skerst ikki burt, at vit nú í áratíggju hava kjakast um, hvussu vit fáa fleiri kvinnur valdar á ting – uttan úrslit, tí tær gerast alsamt færri.

Ført verður fram, at kvinnur hava sama møguleika at stilla upp og at velja kvinnur, sum menn. Men tað er bara ikki gott nokk, tí vit vita øll, hvussu politikkur er, og hvussu tað verður arbeitt í øllum flokkum. Ávísir persónar gera alt fyri at varðveita valdið, og hetta sæst eisini aftur í uppstillingum, har persónar verða settir upp ímóti hvørjum øðrum.

Hvorom alting er, so hevði tað verið áhugavert at sæð, hvussu úrslitið hevði verið, um serligir kvinnulistar vórðu gjørdir í teimum valdømum, har til ber hjá einum flokki at fáa fleiri enn eitt umboð valt. Tað hevði so verið í Suðurstreymoy, har fleiri flokkar hava tvey og trý umboð, í Eysturoy, har Sambandsflokkurin hevur tvey umboð, í Norðoyggjum, har Fólkaflokkurin hevur tvey umboð og í Suðuroy, har Javnaðarflokkurin hevur tvey og onkuntíð trý umboð.

Dentur skal sjálvandi leggjast á, at hetta er IKKI ein broyting í vallógini, men ein møguleiki sum altíð hevur verið – men sum eingin hevur givið sær far um fyrr enn nú. Um hetta verður høvið at fáa fleiri kvinnur valdar á ting, so eigur møguleikin at verða royndur.

Er tað neyðugt at gera Føroyar til eitt valdømi fyri at býta ávirkanina rættvísari millum økini í landinum, so er tað enn meiri neyðugt, at tiltøk verða sett í verk til tess at fáa fleiri kvinnur á ting, tí eyðsæð er, at tað hevði verið betri, rættvísari og so sjálvsagt, at áleið eins nógvar kvinnur sum menn sótu á tingi – hóast onkrir menn verða noyddi at ofra sæti...

**Sosialurin**

## Naivistar og sentralistar funnið saman

**Løgtingsformaðurin hevur av orsøkum, sum bert kunnu gitast um, tikið uppskotið framaftur hjá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni Sjálvstýrisfloksins, sum dyggiliga fall, og við tí spreingir hann samgongustevið**



JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður

Ikki kann sigast annað enn, at vit í dag uppliva ein løgnan politiskan veruleika!

Tað sum politiska ódnarveðrið snýr seg um, er nevniliga eitt uppskot, sum Kári P. Højgaard, løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin legði fyri løgtingið fyri kortum, og sum tingið feldi dyggiliga.

Hetta uppskotið hevur løgtingsformaðurin, av orsøkum, sum vit bara kunnu gita um, nú drigið framaftur fyri at skipa Føroyar sum eitt valdømi.

Í vikuskiftinum hevur verið primitivt stríð millum løgtingsformannin og samgongu-leiðaran, teir biðja hvønn annan um at halda fingrarnar burtur frá hvør sínum uppleggi.

Løgtingsformaðurin, sum er fyrrverandi løgmaður, sendi Sámal Petur í Grund, landsstýrismann heim, tí hesin tá dittaði seg til postitivt at úttala seg um at fremja fast samband til Vágarnar.

Skuldi nakað gerast, segði núverandi løgtingsformaður og táverandi løgmaður, skuldi samgongan standa aftanfyri. Soleiðis vendir alt á høvdið.

**Demokratisk avskeplan**
Sum seinnu vikurnar og kanska mánaðirnir eru gingnir, hevur løgtingsformaðurin við hjálp frá miðstaðarfjølmiðlum, sentralistiskum samfelagsfrøðingum og politiskum naivistum úti um landið, sum ikki síggja vandan í eini uppaftur sterkari misavnan, bara túra fram.

Ongar konsekvensberokningar, kanningar ella djúpri umhugsanir, skulu til. Føroya fólk skal bara góðtaka hesa grundleggjandi broyting av okkara demokratisku valskipan, sum løgtingsvallógin er, sum tveir triðingar av Føroya fólki skal koma at líða undir í komandi tíðum. Hetta er ein demokratisk avskeplan.

**Grønlendska fyrimyndin**
Ein av dyggu eygleiðarunum í Grønlandi, sum býr í næststørsta býnum, tekur soleiðis til, hóast grønlandska broytingin var long umrøða og vælumhugsað, áðrenn lógin um eitt valdømi varð framd, at: "Eg helt tankan um eitt valdømi vera góðan, men nú 10 ár eftir havi eg sæð, hvussu sentraliserandi tað er, har bert fólk í høvuðsstaðnum hava samband við politikaran."

Leggjast kann afturat, at nú búgva 23 av 31 tinglimum í høvuðsstaðnum Nuuk, og sum hann sigur: "Tað kemur mær fyri, at allir politikarar vilja búgva í Nuuk, har alt verður í framtíðini".

Soleiðis veður tað eisini í Føroyum, hóast alstórur munur er á støddini landafrøðiliga.

**Góð loysn**
Tað sum vit eiga at gera er, áðrenn vit avgera um Føroyar skulu verða eitt valdømi, at kommunurnar verða savnaðar í størri eindir og at mál eiga at verða løgd út til tær at umog fyrisita, áðrenn málið um eitt valdømi yvirhøvur verður viðgjørt.

Tað er bert at harmast um, at naivistar úti um landið, sum í veruleika ikki hava hugsað seg um, og ískøldu sentralistarnir hava funnið saman.

Uppskotið hjá floksformonnunum, um eitt nú at ein tinglimur fyribils kemur afturat í Suðurstreymoy, er at liva við, meðan kanningar um so stórar broytingar í løgtingsvalskipanini verða gjørdar.

## Politikarar, brúkið tað, tit hava millum oyruni – og hjartað!

ANNA HENTZE

Nú, ið skotið hevur verið upp at skipa Føroyar sum eitt valdømi, tykjast fleiri politikarar at fagna hesum. Tað sigst at skula framala betri landspolitikarar.

Tó hoyra vit eisini ivasamar røddir hesum viðvíkjandi, og nøkur eru, ið beinleiðis ávara ímóti at broyta hesa skipan.

Vælsignaðu fólk: Leypið ikki á bláman í óðum verkum, áðrenn tit væl og virðiliga, av eini reinari og samfelagsunniligari samvitsku, hava hugsað tykkum um. Takið eisini við í metingum tykkara tað, sum somikið royndir og eitt sindur til aldurs komnir persónar, sum til dømis Zacharias Wang og Jógvan Sundstein, føra fram.

Tað var neyvan í tankaloysi ella av býttiskapi, at skipanin við valdømum í sínari tíð varð smíðað. Og urbaniseringin er ikki minkað við árunum. Hon spelar frameftir við fullari ferð, eisini uttan lógarstuðul.

Vert er, eisini í hesum sambandi, at minnast til gomlu ráðini: "Haldið fast við tað, sum gott er".

Við vinarligari kvøðu.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.